gult cyan magenta svart

Korini á arbei›smarkna›inum skulu betrast



Hans Pauli Strøm tekur sær av arbei›smarkna›armálum í Javna›arflokkinum

Landsstevnan hjá Javna›arflokkinum um vikuskifti› áleg›i flokkinum at bøta munandi um korini á arbei›smarkna›inum. Millum anna› skal barnsbur›arfarloyvi leingjast til tvey ár

JOHN JOHANNESSEN

Reglan um, at fyritøkur vi› skerdari uppsagnarfreist kunnu siga fólki upp, hava tey veri› sjúk meira enn 120 dagar skal burtur.

Hetta var ein av samtyktunum um mundani ábøtur á korini á arbei›smakna›inum á landsstevnu Javna›arfloksins um vikuskifti›.

Í sta›in fyri regluna um 120 sjúkradagar, skal finnast ein skipan vi› einum sjúkrará› á arbei›splássunum, i› skal finna a›rar útvegir enn at senda fólk til hús, hava tey veri› sjúk meira enn 120 dagar í einum ári.

Hetta rá› skal umframt lei›sluna á arbei›splássinum vera manna› av starvsfólkum.

Úrsliti› av hesum heldur Javna›arflokkurin vera, at vit fáa ein rúmligari arbei›smarkna›, i› eisini hevur pláss fyri fólki, sum eina tí› ella varandi ikki hava fullan arbei›sførleika.

Longri farloyvi

Stendur ta› til Javna›arflokkin, skal barnsbur›arfarloyvi leingjast heilt upp í tvey ár, og skal ta› harumframt eisini fevna um tey tímaløntu.

Hetta heldur flokkurin vera eitt t‡›andi familjupolitiskt tiltak.

Barnsbur›arfarloyvi› á arbei›smarkna›inum er í dag hálvt ár vi› løn.

Somulei›is ætlar Javna›arflokkurin sær at virka fyri, at ein barnsbur›argrunnur fyri allan arbei›smarkna›in ver›ur settur á stovn beinan vegin, solei›is at fastlønt og tímalønt eisini her ver›a javnsett.

Fyrrverandi landsst‡rismaðurin í arbei›smarkna›armálum, Finnbogi Arge, bo›a›i annars fyri gó›um ári sí›ani frá, at hann fór at arbei›a fyri at seta á stovn ein barnsbur›argrunn. Hesin barnsbur›argrunnurin er kortini enn ikki vor›in veruleiki.

Eingir karensdagar

Landsstevnan hjá Javna›arflokkinum samtykti eisini, at mismunurin millum tímalønt og fastlønt vi›víkjandi sjúkradagpeningi skal fyribeinast beinan vegin, solei›is at øllum ver›ur tryggja› fult endurgjald undir sjúku frá fyrsta sjúkradegi.

Eftir verandi skipan fáa fastlønt lønt sjúkradagpening frá fyrsta sjúkradegi, me›an tey tímaløntu ikki fáa dagpening fyrr enn frá tri›ja sjúkradegi.

Javna›arflokkurin hevur fyrr saman vi› restini av andstø›uni lagt uppskot fyri tingi› um at broyta hendan misjavna, men uppskoti› var› felt vi› teirri grundgeving, at landsst‡ri› arbeiddi vi› málinum.

Tí›liga í ár kom ein arbei›sbólkur undir Almanna- og Heilsumálast‡rinum vi› einum uppskoti um, hvussu karensdagarnir fyri tey tímaløntu kundu takast burtur, men enn er landsst‡riskvinnan í almanna- og heilsumálum enn ikki komin í tingi› vi› nøkrum uppskoti um hetta.

Hetta var Hans Pauli Støm, sum í Javna›arflokkinum tekur sær av arbei›smarkna›armálum, rættuliga argur um á landsstevnuni. Tí gjørdi hann vart vi›, at flokkurin aftur fer at virka fyri, at fáa hendan ójavna burtur.

Lækka pensjónsaldurin

Semja var á landsstevnuni um, at pensjónsaldurin fyri fiskimenn eigur at ver›a lækka›ur. Mett var›, at fiskima›urin slítist meira enn vanligi arbei›sma›urin.

Tí var› samtykt, at Javna›arflokkurin skal virka fyri, at pensjónsaldurin fyri fiskimenn ver›ur lækka›ur úr 67 árum ni›ur í 60 ár.

Eisini fer Javna›arflokkurin at virka fyri, at ein n‡ggj útbúgvingarskipan fyri arbei›smarkna›in ver›ur sett á stovn og ver›ur tengd at eini lóggávu um farloyvisskipanir og lønarendurgjald.

Landsstevnan var samd um, at ójavnarnir og ótryggleikin á arbei›smarkna›inum eru øktir undir sitandi samgongu, og tí er tørvurin á ábótum á arbei›smarkna›arpolitikkin vor›in átrokandi.

Vandi vi› vir›isbrævamarkna›i

Ver›ur ein føroyskur vir›isbrævamarkna›ur settur á stovn, er vandi fyri, at tey stóru almennu feløgini í Føroyum ver›a seld á útlendskar hendur, heldur Jóannes Eidesgaard

JOHN JOHANNESSEN

Vandi er fyri, at landsst‡ri› á einum føroyskum vir›isbrævamarkna›i fer at selja út av stóru almennu feløgunum, fyri at fíggja eina skiftistí› í fullveldismálinum.

Hetta vísti Jóannes Eidesgaard, forma›ur Javna›arfloksins, á í formansfrágrei›ing síni á landsstevnuni í læraraskúlahøllini í Havn fríggjakvøldi›.

– Uppskot um búskapargrunn, sum skal fíggja skiftistí›ina hevur veri› at hoyrt. Men ein grunnur er bert naka› verdur, um pengar eru í honum.

Jóannes Eidesgaard heldur, at ver›ur ein føroyskur vir›isbrævamarkna›ur settur á stovn, ætlar landsst‡ri› helst, at Atlantic Airways, Føroya Tele, Føroya Fiskavirking og onnur líknandi almenn feløg ver›a skrásett á hesum markna›.

– Sleppa tá útlendingar framat, vita vit, hvat klokkan er sligin, seg›i Jóannes Eidesgaard.

Tá ver›ur arvasilvuri› eftir hansara fatan nevniliga selt, solei›is at sølupengarnir kunnu fíggja skiftistí›ina, danir ikki vilja lata landsst‡rinum, í hvørfall í eina tí›.

Landsstevnan tók undir vi› hesi fatan og samtykti, at stu›la floksins stø›u ímóti at avrei›a almennar ognir til privatar fyri løtuvinning, sum skal fíggja fullveldi›.

Samtyktin tekur eisini undir vi› or›unum hjá Jóannes Eidesgaard um, at privatisering í veruleikanum er ein avdemokratisering, har fólksins møguleikar fyri ávirkan eru burtur og vir›ini í sta›in latin spekulantum at gera sær dælt av.

Starvsnevndin ví›ka›

Javna›arflokkurin valdi á landsstevnuni leygardagin tvey umbo› afturat í starvsnevnd floksins

JOHN JOHANNESSEN

F‡ra n‡ggir limir komu í starvsnevdina hjá Javna›arflokkinum, tá landsfundurin leygardagin atkvøddi um, hvørjir limir skulu manna nevndinia komandi ári›.

Nevndin er nú ví›ka› vi› tveimum limum og tveir av gomlu limunum, i› ikki tóku vi› afturvali, eru skiftir út.

Á landsfundinum í Skopun í fjør var› gjørt av, at starvsnevndin skuldi ví›kast vi› tveimum limum. Næstformennirnir skulu nú vera tveir, harav annar skal vera kvinna. Harumframt skal tali› av vanligum nevndarlimun nú vera ein meira enn á›ur.

N‡ggju limirnir í starvsnevndini eru nú Jansy Olsen úr Eysturoyar Javna›arfelag, Katrin Dahl Jacobsen og Bergur Dam úr Su›urstreymoyar Javna›arfelag og Ragnhild Olsen frá SU.

Bergur Dam og Jansy Olsen hava nú tiki› vi› sum næstformenn eftir Dan Reinert Petersen, sum hevur veri› næstforma›ur seinastu árini.

Mælir til fiskidagamarkna›

Landsstevna Javna›arfloksins mælir í samtykt síni til, at ein fiskidagamarkna›ur ver›ur settur á stovn at umsita fiskidagar og rættindi

JOHN JOHANNESSEN

Verandi fiskidagaskipan ver›ur misn‡tt og má broytast.

Hetta vóru fólk samd um á landsstevnu Javna›arfloksins um vikuskifti›.

Tí samtykti landsstevnan at mótmæla, at fiskirættindi og fiskidagar eru vor›in handilsvøra hjá nøkrum fáum at ríka seg upp av.

Landsstevnan mælir í fundarsamtyktini til at broyta fiskidagaskipanina og seta á stovn ein fiskidagamarkna› at umsita fiskidagar.

Hetta, heldur Javna›arflokkurin, hev›i møguleikunum hjá n‡ggjum fólki at sleppa uppí fiskivinnuna.

Flokkurin heldur nevniliga, at verandi skipan for›ar n‡ggjum fólkum at koma upp í skipanina. Hetta orsaka› av spekulatión og handli vi› fiskirættindum.

Nor›streymoyar Javna›arfelag luttók virki› í or›askiftinum á landsstevnuni

Mynd: Sofus Johannesen

The Grand Old Man í Javna›arflokkinum, Atli Dam, fylgdi væl vi› or›askiftinum á landsstevnuni um vikuskifti›

Vága Javna›arfelag var sum altí› væl umbo›a á fundinum

Javna›arkvinnur hugsunarsamar

Myndir: Sofus Johannesen

Næstforma›urin var gestur

JOHN JOHANNESSEN

Næstforma›urin í danska fólkatinginum, Ole Løvig Simonsen, var gesarø›ari á landsstevnuni hjá Javna›arflokkinum í ár.

Í rø›u síni fegna›ist hann um stóra yvirskoti› á fíggjarlógini og røddi annars um ríka mentanarlívi› í Føroyum.

Ole Løvig Simonsen seg›i einki um stø›u sína til fullveldismáli›. Heldur ikki vildi hann gera nakrar vi›merkingar til Sosialinum um ríkisrættarligu stø›una.

– Ta› einasta, eg vil siga er, at eg taki fult undir vi› gó›u rø›uni hjá Jóannes Eidesgaard, var vi›merkingin frá Ole Løvig Simonsen.



Ole Løvig Simonsen, næstforma›ur á fólkatingi, var gestarø›ari á landsstevnuni hjá Javna›arflokkinum um vikuskifti›

Mynd: Sofus Johannesen